# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Brown er best egnaður til at sita á einari skrivstovu og at hava eftirlit við øllum hinum*
*(Charles Clarke)*

*Viktor Jusjtsjenko, forseti, hevur koyrt tingið til hús. Avgerðin kann fáa álvarssamar avleiðingar.*



# Kann enda við ruðuleika í Ukraina

**Avgerðin hjá Viktor Jusjtsjenko, forseta at koyra tjóðartingið til hús og at skriva út nýval kann enda við, at Ukraina fer í tvíningar**

- Tað er mín rættur og mín skylda at uppløysa tjóðartingið, sum hevur brotið stýrisskipanina, og tí verður val til nýtt tjóðarting tann 17. mai, segði Viktor Jusjtsjenko í ukrainska sjónvarpinum í gjárkvøldið.

Sendingin var ikki meiri enn liðug, tá tjóðartingið varð boðsent í skundi at viðgera avgerð forsetans, og viðgerðin har vísti, hvussu langt er ímillum forsetan og tingið. Meirilutin gjørdi greitt, at hann virðir ikki avgerðina hjá forsetanum, tí hon er mest átøk einum kvetti, og harafturat boðaði meirilutin frá, at tingið fer ikki at fíggja tað ætlaða valið í næsta mánað.

Politiskir eygleiðarar í Ukraina søgdu í gjárkvøldið, at tann spenta støðan millum tingið og forsetan kann elva til ruðuleika, og blaðið Sevdonja, sum plagar at styðja stjórnina, skrivaði, at ósemjan kann enda við, at Ukraina fer í tvíningar - ein eystara og ein vestara part.

**Prutlað leingi**

Tað hevur prutlað undir lokinum í Ukraina leingi. Í fjør taptu forsetin og stuðlar hansara tjóðartingsvalið, og viðurskiftini illum Jusjtsjenko og Viktor Janukovitsj, forsætisráðharra eru støðugt versnað síðani.

Samstundis hevur Jusjtsjenko mist ein stóran part av teirri undirtøkuni, sum hann fekk, tá hann stóð á odda fyri kollveltingini. Nógvir ukrainar halda, at hann hevur svikið lyftini, sum hann gav teimum undir kollveltingini, og mong halda eisini, at hann hevur gjørt viðurskiftini við Russland verri, enn gott er.

Í gjárkvøldið vóru umleið 3.000 mótmælisfólk komin saman í miðbýnum í Kiev at mótmæla politikkinum hjá forsetanum. Kvøldið fyri vóru tey 450 í tali, men eygleiðarar í Kiev vænta, at talið fer at veksa nógv teir næstu dagarnar.

ES-umboðsmaðurin í Ukraina, Reinhard Schäfer, ávaraði í gjárkvøldið partarnar ímóti at herða ósemjuna og at leypa framav.

# Hann kann bjóða Gordon Brown av

**Leingi hevur tað verið mett sum givið, at Gordon Brown skal taka við eftir Tony Blair. Men nú kemur ein avbjóðari**



Fyrrverandi bretski innanríkisráðharrin Charles Clarke var einaferð ein av argastu mótstøðumonnunum hjá Gordon Brown, fíggjarmálaráðharra og komandi eftirmanni hjá Tony Blair sum floksformanni og harvið forsætisráðharraevni hjá Labour.

Síðani hann fór frá, hevur lítið verið at hoyra til hansara, men seinasta vikuskiftið gav hann aftur ljóð frá sær. Í einari blaðsamrøðu eggjaði hann David Miliband, umhvørvismálaráðharra til at stilla upp ímóti Gordon Brown sum floksformanni. Men tað vóru tey næstu orðini, sum vaktu størri ans.

- Vil David ikki stilla upp, fari eg kanska at gera tað, segði Charles Clarke við The Independent.

*Charles Clarke*

STUTT SAGT

## Friðarhermenn álopnir

Fimm hermenn úr teimum friðarvarðveitandi herdeildunum hjá afrikanska eindarfelagsskapinum doyðu í einum álopi í sudanska landspartinum Darfur í gjár. BBC sigur frá vælvitandi keldum, at hermenninir stóðu á varðhaldi við ein vatnbrunn, tá ókendir menn lupu á teir. Fýra av teimum fimm doyðu beinanvegin, og tann seinasti doyði seinni á sjúkrahúsi. Herdeildirnar hjá afrikanska eindarfelagsskapinum eru undir stórum trýsti í Darfur, og sudanska stjórnin hevur sýtt ST at senda hermenn at hjálpa deildunum. Tað hevur fingið Rwanda at hóta við at taka sínar hermenn heim úr Darfur, fáa teir ikki hjálp.

## Tann seinasti deyður

Bernd Freytag von Loringhoven, sum gav Hitleri tær seinastu upplýsingarnar um framgongdina hjá sovjetska herinum ímóti Berlin, er deyður. Loringhoven, sum var barónur, var 93 ára gamal, nú hann doyði. Hann var saman við Hitleri tann seinasta mánaðin, og tað eydnaðist honum at sleppa út, áðrenn sovjetski herurin oyðilegði støðina hjá Føraranum tann 29. apríl í 1945. Loringhoven bar orð fyri at vera sera gløggur og fyri at hava sera gott minni, og hann gav høvundum og øðrum nógvar upplýsingar um seinastu dagar Hitlers.

## Syrgdu hundin

At fólk kunnu gerast góð við hundin er hendan søgan úr India eitt gott dømi um. Sunnudagin fann løgreglan í býnum Hyderabad ein 67 ára gamlan mann og 63 ára gomlu konu hansara deyð. Tey høvdu hongt seg. Frá grannunum og nærstingunum fekk løgreglan at vita, at tey bæði høvdu júst mist hundin "Poppy". Tey høvdu boðið grannum og skyldfólki til ervi, og tá gestirnir vóru farnir, høvdu tey bæði hongt seg. Í einum brævi, sum tey høvdu lagt eftir seg, stóð, at tey høvdu einki at liva fyri longur, nú tann 13 ára gamli hundurin var deyður.